

**Tann triði vegurin.** *Darwinisman hevur nakrar veikleikar, og so leingi sum lívfrøðin ikki viðurkennir hetta, fer religiøsi kritikkurin at standa sterkur. Tað metir professarin á Københavns Universitet, Jesper Hoffmeyer, sum vil styrkja náttúruvísindina yvir fyri religiøsari fundamentalismu.*

MYND: POLFOTO

stýra okkara lívið í smálutir, men eisini okkara samskifti við og tulking av umheiminum. Og sambært Hoffmeyer er hetta ástøðið betri ført fyri at forklára, at vit menniskju yvirhøvur hava eina tilvitsku. Eina sálarliga dimensjón. Eitt subjektivt »eg«, sum er ført fyri at uppliva heimin rundanum seg.

– Heimurin er ikki ein kemisk maskina, og lív er ikki bara eitt úrslit av eini blindari genetiskari úrveljing. Øll livandi náttúra hevur eginleikan at stremba eftir nøkrum málum. At náttúran sjálv er før fyri at skapa og agera miðvíst ímóti einum máli, kann darwinisman ikki forklára, heldur Hoffmeyer.

Tí má eitt og hvørt erligt vísindafólk viðganga, at menningin av øllum lívi heilt fram til homo sapiens – tað er menniskjað – er ein risastór gáta, sum ikki kann loysast við darwinismuni eina.

– Tann dagin náttúruvísindafólk viðurkenna hetta, stendur vísindin nógv sterkari yvirfyri teimum kreftum, sum ikki standa á einum náttúruvísindaligum grundarlagi. Tað vil siga tey, sum heldur vilja forklára alheimin út frá ævintýrum og yvirtrúgv, sigur Jesper Hoffmeyer.

## Intelligent ørvitistos

Fremsti kritikkurin av darwinismuni kemur í stóran mun frá tí sonevnda »intelligent design« hugtakinum, sum í stuttum sigur, at alheimurin er so mikið kompliseraður og væl skipaður, at ein skapari má standa aftanfyri. Ein sniðgevi, sum hevur skapt fortreytirnar fyri lívinum á jørðini.

Men gamli 68'arin yvirav mær brýggjar seg milt sagt ikki um hesa tesuna, sum í stóran mun kemur frá kristnum vísindafólkum í vesturheiminum.

– Hugskotið um »intelligent design« sigur í grundini, at av tí at vit menniskju ikki skilja alt her og nú, so má ein Gud vera til. At skifta vísindaligu metoduna út við spekulativa religión er í veruleikanum at útskriva ein blankokekk, tí tá strikar man allar sannleikatreytir og gevur sær sjálvum loyvi til at trúgva hvørjum sum helst, heldur Jesper Hoffmeyer.

Men professarin noktar samstundis at fara í hina grøvina og hálsfevna ta lívfrøðina, sum systematiskt letur eyguni aftur fyri teimum gátum, sum enn ikki kunnu forklárast. Lívfrøðin megnar sambært Hoffmeyer ikki at greiða spurningin, hví menniskjur eru menniskjur og ikki robottar. Lívfrøðin kann siga nakað um, hvussu heilin virkar, og hví vit hava tað, sum vit hava tað. Men lívfrøðin kann ongantíð forklára ta subjektivu upplivingina hjá hvørjum einstøkum menniskja. Lívfrøðin kann forklára depressión við at siga, at vit mangla tey og tey evnini í heilanum, sum skapa mentala vælveru. Men hon kann ongantíð siga nakað um, hvussu tað reint subjektivt er at vera deprimeraður.

– Tann víðgongda darwinisman og tann religiøsa fundamentalisman geva okkum eitt órímiligt val. Antin skulu vit trúgva uppá eina biokemiska náttúru, sum ikki rúmar tí andaliga partinum av menniskjanum. Ella skulu vit trúgva uppá eina sál, sum vit skulu hava fingið frá einum Gudi. Tað má vera ein millumvegur, heldur Hoffmeyer.

Tann triði vegurin er at menna eina lívfrøðiliga menningarlæru, sum í størri mun rúmar tí immateriella partinum av menniskjanum. Biosemiotikkurin er ein roynd, hóast hetta ástøðið ikki loysir gátuna um ta menniskjansligu tilvitskuna og heldur ikki fer at avtaka stríðið millum átrúnaðin og vísindina.

– Mítt mál er at koma fram til eitt vísindaligt forstáilsi av lívinum, sum ikki avnoktar tær andaligu síðurnar av tilveruni, sum menniskjan higartil bert hevur funnið í átrúnaði og mystikki.

## Ivin í hásætið

*»Det kan godt være, det er dybt menneskeligt at være troende. Men mennesket er helt sikkert det eneste dyr, der kan tvivle. Intet er nemmere end at blive i sin tro. At blive i sin tvivl, at tåle den, er den egentlige opgave. Det er det, der gør os til ansvarlige mennesker«.*

Soleiðis endar Jesper Hoffmeyer sína nýggjastu bók. Eg biði mannin útgreinað hesar reglur, og hann fer at práta um ivan, sum er tann mest háborna meginreglan í øllum vísindaligum arbeiði. Ja, hann fer enntá so langt sum at siga, at tað at ivast í øllum er ein beinleiðis moralsk skylda. Og hann eftirlýsir, at hansara lívfrøðiligu starvsfelagar eisini loyva ivanum framat. Og at lívfrøðin verður meiri tilvitað um, at hennara útgangsstøði stundum er meiri ideologiskt enn tað er vísindaligt.

– Í staðin fyri at viðurkenna teir veikleikar, sum ein og hvør teori hevur, so hevur náttúruvísindin fingið ein dogmatiskan profil, sum ger hana veikari og meiri viðbrekna yvir fyri kritikki, heldur Hoffmeyer.

Professarin óttast, at tann stívrenda og treiska burturvísingin av øllum, sum

> At tola at ivast er tann veruliga uppgávan

ikki kann mátast og vigast, hevur rikið nógv djúphugsin menniskju í armarnar á alskyns yvirnatúrligum søgum um universið, sum einki hava við vit og skil at gera.

– Fólk kenna seg ikki aftur í tí neo-darwinistisku søguni um heimin og um menniskja. Tí flýggja tey til okkurt annað. Og religiøsu fundamentalistarnir hava rætt í, at læra Darwins ikki er ein total og fullfíggjað frágreiðing um lívsins menning á jørðini. Men tað átti vísindin sjálv at komið fram til, endar Jesper Hoffmeyer.